# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

†

## Andlát og jarðarferðir

**Herdis Müller** fer til gravar úr Ebenezer fríggjadagin klokkan 14. Tey, ið vilja minnast Herdis kunnu lata Zarepta eina gávu. Konta í peningastovnum.

**Dagurin**
**26. oktober. Amandus.** Fleiri halgimenni bera hetta navnið, og allir hava teir verið biskupar, og allir hava sama halgidag. Ikki er gjørligt í dag at gera av, hvønn sipað verður til. Navnið er av latínskum uppruna og merkir: tann sum eigur at verða elskaðu

Lesið
Sosialin

# Streingjakórið á Toftum 50 ár

TÍÐINDASKRIV

3. november verður hátíðardagur í missiónshúsinum Tabor á Toftum í sambandi við at 50 ár er liðin síðan streingjakórið byrjaði.

Streingjakórið á Toftum var fyrsta streingjakór í Heimamissiónini. Tað var Søren Hansen (nú Steinhólm), sum saman vi systrunum Judith og Danu stovnaði kórið.

Søren hevði verið á bibliuskúla í Norra, og har upplivdi hann nógvan sang Innan fyri missiónina. Hann fekk so íblástur til at byrja eitt streingjakór í heimbygdini. Søren spældi gittara og Judith umsetti sangir, sum kórið kundi syngja.

Judith doyði í 1982, og við gravarbakkan segði Søren, at hann sum leiðari hjá streingjakórinum altíð var komin til dekkað borð, tí at Judith hevði umsett sangir, sum hann kundi velja ímillum.

Streingjakórið hevði stóran týdning fyri tey ungu tey fyrstu árini, sigur Dana. Søren var leiðari hjá streingjakórinum í nógv ár, inntil Hans Jacob Hansen, sum enn er leiðari, tók yvir.

### Hátíðarhald

Nú tað eru 50 ár liðin síðan kórið byrjaði, skipar streingjakórið fyri einum hátíðardegi, har øll, sum hava sungið við gjøgnum árini, verða boðin við.

Dagurin verður hildin leygardagin 3. november við morgunmati kl. 10, og tað verður hildið fram allan dagin við sangvenjing, hugna og ábiti. Endað verður við einum sangmøti kl. 19.30.

Vit vóna at síggja so nógv sum gjørligt, sum hava sungið við kórinum gjøgnum árini, siga fyrireikararnir.

Heitt verður á fólk um at boða frá luttøku áðrenn 31. oktober hjá Kaj á tlf. 447406/237272 ella Peturi á tlf. 447851/217851.

# Framsýning í Smiðjuni

Í døgunum 25.-30. oktober fer Astrid Mouritsen, listakvinna, at sýna málningar fram í Smiðjuni í Lítluvík. Málningarnir eru allir akryl upp á lørift. Myndevnið hjá Astrid er sum oftast náttúran og menniskju, lýst á ein abstraktivan hátt. Henni dámar væl at spæla við ymiskum litsamansetingum.

Astrid er úr Klaksvík og búsitandi í Sørvági. Hon hevur teknað og málað frá barndómi av. Hon hevur verið á háskúla í Danmark og í kvøldskúla hjá Archibald Black og Pól Skarðenni. Hon hevur tikið ymisk skeið, m.a. hjá Randi Gunnarsdóttir, og hjá danska listamanninum, Birger Møller. Astrid hevur sýnt fram ymsastaðni, m.a. á Norðoyastevnuframsýning, Lions Club, Café 45 og í Snarskivuni í Tórshavn.

Málningar eru eisini javnan at síggja í Glarsmiðjuni í Havn. Astrid arbeiðir sum miðlagrafikari, og tekur sær tíð til at mála eftir arbeiðstíð. Í løtuni er hon í barnsburðarfarloyvi. Við á framsýningini verður eisini Dagny Tróndheim, mamma Astrid.

Framsýningin letur upp hósdagin 25. oktober kl. 15.00, har øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið. Annars er framsýningin opin frá 25. til 30. oktober, allar dagar frá kl. 15.00-19.00.



*Í døgunum 25.-30. oktober hevur Astrid Mouritsen, listakvinna, málningaframsýning í Smiðjuni í Lítluvík*

# VIÐMERKINGAR

## Eitt valdømi = minni klandur

RÓALDUR JÁKUPSSON
HD/U og sjálvstøðugur vinnurekandi

Við at fáa bara eitt valdømi, er ein av stóru orsøkunum til vælkenda føroyska klandri burtur.

Føroyingar eru protektionistiskir. Tá talan er um lokalpolitikk, hugsa vit bara um okkara lítla umráði. Vit eru í kapping við restina av føroyingum. Vit skulu hava áðrenn tey, ella blíva vit fornermað og stemma ikki fyri onkrum uppskoti, sum kemur frá teimum. Tað er líkamikið um teirra íløga er fornuftigari og betri fyri alt landið. Nú eiga vit tørn, so skít verið við rest!

Vit eru protektionistisk, tá talan er um uttanríkispolitikk. Tá hugsa vit bara um okkara lítla land. Vit eru í kapping við restina av heiminum. Vit skulu hava meir enn hini. Vit skulu sleppa at starvast og hátta okkum sum vit hava hug, hvar sum helst, men ongin skal koma her og hava nakað við okkum at gera. Í Føroyum hava vit nokk í okkum sjálvum, vit mugu verja okkum so ongin kemur og ger íløgur í vinnur her á landið, tí í síðsta enda vilja tey sjálvandi yvirtaka alt virksemi, so onki er eftir til okkum. Vit mugu verja okkum so ongin kemur at starvast her. Vinnan liggur gott nokk á knæ og skríggjar eftir arbeiðsmegi við sínum síðstu kreftum, men tá hendan arbeiðsmegi er komin, so er ongin vegur aftur, so eru tey ein hóttan ímóti okkum.

Tá talan er um annaleiðis hugsandi menniskju, ella menniskju við lívsstíli, sum líkjist ov nógv frá ”føroyska norminum”, so eru vit eisini protektionistisk. Vit eru bangin fyri at muslimar skulu yvirtaka landið, vit eru bangin fyri avkristnan, vit eru bangin fyri homoseksuellum og reyðvínsnjótarum. Vit eru bangin fyri fólki við ov stórum ætlanum osv.

Hendan provensiella ræðslan er væl á veg at doyggja út, við at vit fáa eitt valdømi. Nú er ein stemma líka góð hvar sum helst í landinum hon kemur frá og allir dómadagsprofetarnir, sum hava trútta hendan óttan inn í føroyingar mugu reka veruligan landspolitikk. Nú er slutt við protektionismu og suboptimering.

Føroyingar skulu standa saman um hetta lítla landið. Vit eru bara 50 túsund fólk á fáum kvadratmetrum, so tað átti ikki at verið ógjørligt at verið meira góð við hvønn annan. Her skal vera pláss fyri okkum øllum somlum í Føroyum.